# Hava fólk til rukku

**Tað er at hava fólk til ta turru rukku at fáa tey at undirskriva eina lógarkravda váttan fyri síðani sjálvur at ganga beint í móti hesum, sigur formaðurin í felagnum Línuskip**

VEIÐILOYVI
*Edvard Joensen*

Fiskimálaráðið kravdi av gomlu eigarunum av Ågot, at teir saman við norðmonnunum, sum keyptu skipið, skrivaðu undir, at skipið ongantíð aftur kom í føroyska fiskiflotan.

– Kortini letur sama umsiting hetta góða skip fáa veiðiloyvi undir føroyskum flaggi í føroyskum sjógvi. Tað er beinleiðis ein háðan móti teimum monnum, sum hesi krøv vórðu sett til, og sum settu sína undirskrift undir tey, sigur formaðurin í felagnum Línuskip, Rólant Poulsen.

Hann leggur ikki fingrarnar ímillum og sigur, at stóð tað upp til hansara og felagið, hann umboðar, skuldi bæði landsstýrismaðurin og øll embætisfólkini, sum hava umsitið hetta málið, verðið koyrd úr starvi.

– Tað eru somu menn, sum hava undirskrivað skjølini, sum áleggja skipinum ongantíð aftur at fiska undir føroyskum flaggi, ið stutt eftir geva tí júst hesi rættindi, vísir Rólant Poulsen á.

Ågot 1 fekk veiðiloyvi aftur við teirri grundgeving frá Fiskimálaráðnum, at hóast skipið varð strikað úr føroysku skrásetingini, var tað ongantíð fysiskt farið úr Føroyum, men lá við føroyska bryggju alla tíðina.

– Tað kann gera tað sama, hvar skipið var statt. Tað var norkst. Norðmenn rindaðu havnargjald fyri tað, meðan tað lá í Klaksvík, og sostatt er eingin ivi um, at talan er um eitt innflutt skip, sigur Rólant Poulsen.

Tá Sosialurin tosaði við hann týsmorgunin, hevði hann ikki fingið niðurstøðuna hjá landsstýrismálanevndini og vildi tí ikki gera viðmerkingar til hana.

– Men givið er, sigur Rólant Poulsen, at málið er ikki liðugt enn. Nú fara vit at tosa um, hvat eftirspælið av hesum verður.



*Landsstýrismaðurin og fiskivinnuumsitingin eiga at leggja frá sær, sigur formaðurin í felagnum Línuskip, Rólant Poulsen*

# Fiskimálaráðið framdi lógarbrot

**Landsstýrismálanevndin sigur í fyribils niðurstøðu síni til málið um veiðiloyvið hjá Jógvani S, at Fiskimálaráðið framdi lógarbrot, tá fiskiorkan hjá línuskipinum Jógvani S varð útroknað**

VEIÐILOYVI
*Edvard Joensen*




*Veiðiloyvið hjá línuskipinum Jógvani S er orsøk til, at landsstýrismálanevndin metir, at landsstýrismaðurin við fiskivinnumálum hevur brotið landsins lógir*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Landsstýrismálanevndin sigur beinleiðis í niðurstøðu síni, at viðgerðin hjá Fiskimálaráðnum av málinum um Jógvan S - fyrrverandi Ågot 1 - var ólóglig.

Grundin til, at landsstýrismálanevndin tekur so rívan til, er tann, sigur nevndin í niðurstøðu síni, at: ».......atlitini, ið lógu til grund fyri avgerðini, vóru ósaklig.«

Avgerðin, sipað verður til í hesum føri, er tann, Fiskimálaráðið tók, tá veiðiorkan hjá Jógvani S var útroknað. Veiðiloyvið, sum Jógvan S fekk, var flutt frá einum minni línubáti umframt einum deksfari, ið aftur hevði tvey loyvi frá tveimum smáum deksbátum.

Treytin fyri at flyta veiðiloyvi millum før er, at veiðiorkan hjá tí, sum fær loyvið, er tann sama ella minni enn hjá tí, sum loyvið verður flutt frá.

Landsstýrismálanevndin leggur her beinleiðis landsstýrismannin við fiskivinnumálum undir ikki at fylgja landsins lógum. Nevndin sigur soleiðis:

».....Hóast lógin áleggur landsstýrismanninum at gera reglur um, hvussu fiskiorka verður roknað út, og um mannagongd fyri samanlegging og umsiting, so er hetta ikki gjørt. Óskrivaðu leiðreglurnar, ið vóru nýttar at meta um, hvørt fiskiorkan hjá fyrrverandi Ågot XPZD var tann sama ella minni enn fiskiorkan hjá Skørini og Barinum, vóru ikki sakligar. Verður sammett við tær leiðreglur, ið nú eru ásettar við kunngerð, var veiðiorkan økt við umleið 94%, tá veiðiloyvini hjá Skørini og Barinum vóru flutt á fyrrverandi Ågot XPZD. Sum nevnt kann landsstýrismálanevndin tó ikki seta seg sum dómara yvir, hvussu rættast er at útrokna fiskiorku. Hendan heimildin liggur framvegis hjá landsstýrismanninum Ì fiskivinnumálum.«

Til at rokna veiðiorkuna út, verður rúmdin á skipinum vanliga nýtt. Og um so varð gjørt í hesum førinum, hevði veiðiorkan hjá Jógvani S verið 94 prosent størri, enn hon var hjá førunum, sum veiðiloyvið varð flutt frá.

Men so hendi tað, at Fiskimálaráðið broytti roknihátt og nýtti kvadratrótina av rúmdini ístaðin og kom soleiðis fram til, at veiðiorkan hjá førunum, ið talan var um, kundi sammetast, og veiðiloyvini flytast frá Skørini og Barinum til Jógvan S.

Eitt annað, sum landsstýrismálanevndin setir spurnartekin við í frágreiðing síni er, um landsstýrismaðuin við fiskivinnumálum, ella í hansara stað Fiskimálaráðið, yvirhøvur hevði heimild at lata Jógvani S nakað fiskiloyvi.

Jógvan S, sum tá æt Ågot 1, varð nevniliga sambært lógarásettari treyt strikað úr føroysku skipaskrásetingini, tá táverandi eigararnir fingu innflutningsloyvi til eitt annað fiskifar, sum øll loyvi hjá gomlu Ågot vórðu flutt yvir á.

Eftir somu reglum og lógarásettu treytum skrivaðu bæði seljarin og keyparin, sum var norskt felag, undir, at skipið ongantíð aftur mátti fara til fiskiskap í føroyskum sjógvi ella undir føroyskum flaggi. Skipið varð lagt við bryggju í Klaksvík, og norska felagið átti skipið við mús, men uttan mann kortini.

Seinni varð skipið so aftur keypt av føroyskum felag, sum hóast allar hesar lógarásetingar og undirskriftir frá fyrrverandi eigarum, fekk veiðiloyvi undir føroyskum flaggi.

Tað er millum annað hetta, sum landsstýrismálanevndin nú setir spurnartekin við tað lógliga í.

Landsstýrismálanevndin ger onga niðurstøðu um, hvørt málið skal fáa avleiðingar fyri landsstýrismannin ella aðrar partar av fiskivinnuumsitingini. Tað leggur hon yvir á landsstýsismannin sjálvan, løgmann ella løgtingið at avgera.

Jacob Vestergaard, landsstýrismaður við fiskivinnumálum, er burturstaddur, og tað eydnaðist ikki at fáa viðmerking frá honum, áðrenn blaðið varð prentað



# Gamla Ternan á veg úr flotanum

**Strandfaraskip Landsins hevur lýst gomlu Ternuna til sølu, og hægsta boðið var 750.000 krónur. Skipið fer helst av landinum**

SKIPASØLA
*Stefan í Skorini*



*Hægsta boðið uppá Ternuna 1 var 750.000 krónur, og tað var frá einum útlendskum keypara. Alt bendir á, at gamla Ternan ikki verður at síggja í Føroyum í framtíðini*
*Savnsmynd*

Freistin at lata tilboð uppá Ternuna 1 ella gomlu Ternuna, sum skipið eisini verður rópt, var úti fríggjadagin 20. juni. Tilboðini, sum vóru fimm í tali, vórðu latin upp mánadagin. Hægsta boðið, sum er 750.000 krónur, var frá einum útlendskum keypara.

Stjórin á Strandferðsluni, Kristian Davidsen, upplýsir, at fýra av teimum fimm tilboðunum vóru frá føroyingum, men tað hægsta tilboðið kom also úr útlondum.

Strandfaraskip Landsins hava gjørt av at arbeiða víðari við hesum tilboðnum, og tí bendir alt á, at Ternan fer úr føroyskum sjógvi í næstum.

## Einki siglingarloyvi

Ternan 1 varð tikin úr sigling tann 1. mars, tá farleiðin millum Havnina og Skálafjørðin varð niðurløgd. Síðani tá hevur skipið ligið við bryggju í Vestmanna.

Ternan er ikki í klassa, t.v.s. at hon hevur einki siglingarloyvi, sum er útgingið, og tí kann tað ikki sigla við ferðafólki í løtuni. Strandfaraskip Landsins hava ikki viljað endurnýggjað loyvið, tí ætlanin var at selja skipið.

Strandferðslan keypti Ternuna í 1970 úr Týsklandi, og hon røkti farleiðina millum Klaksvík og Leirvík fram til 1980, tá nýggja Ternan varð sett í sigling. Síðani broytti skipið navn til Ternan 1 og sigldi fyri tað mesta millum Havnina og Skálafjørðin og um Vestmannasund.

Gamla Ternan varð smíðað í 1960 í Wawelsflath í Týsklandi og hevur tískil 43 ár á baki.

# Fogh sleppur neyvan við Brimli

**Sekstan umsóknir vóru til tey sjey størvini sum maskinmeistarar umborð á skipunum hjá Fiskiveiðieftirlitinum, og umsøkjarar kunnu vænta sær svar síðst í hesi vikuni. Ætlaði túrurin hjá Anders Fogh Rasmussen við Brimli verður helst av ongum vegna vantandi maskinmeistarar**

BRIMIL
*Stefan í Skorini*



*Anders Fogh Rasmussen skuldi ein túr við Brimli, men hetta verður helst av ongum, tí nýggir maskinmenn eru ikki settir enn*

– Vit hava tilsamans fingið sekstan umsóknir, og tær verða viðgjørdar í hesi vikuni, sigur Elmar Højgaard, stjóri á Fiskiveiðieftirlitinum.

Tað eru sjey størv, sum eru lýst leys. Tvey størv sum maskinstjóri, tvey størv sum 1. meistari og trý størv sum 2. meistari. Umsøkjarar kunnu vænta sær at fáa svar hósdagin ella fríggjadagin.

Elmar Højgaard váttar, at allir teir tíggju maskinmeistararnir, ið upprunaliga søgdu seg úr starvi, og sum alt rumblið snýr seg um, hava søkt størvini av nýggjum.

Trupulleikin er, at tað eru bert sjey størv lýst leys. Hini trý eru longu sett. Tí er ikki líkt til, at allir maskinmeistararnir fáa síni gomlu størv aftur, soleiðis sum Maskinmeistarafelagið hevur kravt.

## Fogh fyri ongum

Sambært skránni hjá Statsministaranum Anders Fogh Rasmussen skulu hann og løgmaður Anfinn Kallsberg hava fund umborð á Brimli hósmorgunin, og tíðindafundur við teimum báðum skuldi vera klokkan 11.30 eisin umborð á nýggjasta vaktarskipinum.

Síðani varð ætlanin at sigla við skipinum til Suðuroyar, men hetta verður helst av ongum. Stjórin í Fiskiveiðieftirlitinum væntar ikki, at hesin túrurin verður veruleiki.

Orsøkin er tann einfalda, at ov fáir maskinmenn eru at manna Brimil, og tí kann skiparin ikki sigla Fogh og Kallsberg til Suðuroyar.

## Framsýningin Veiðimentan í Útnorði verið í Nuuk

FRAMSÝNING
*Stefan í Skorini*

Framsýningin Veiðimentan í Útnorði er nú eisini at síggja í Grønlandi. Framsýningin var í Norðurlandahúsinum í fjør summar, tá ikki færri enn 12.000 fólk vitjaðu framsýningina í fjúrtan dagar. Tá gav forlagið Sprotin eisini út umfatandi bók, sum á donskum og enskum lýsti evnið veiðimentan í Útnorði.

Tað er Edward Fuglø, sum hevur sniðgivið, og Birgir Kruse, sum hevur samskipað framsýningina.

Fríggjadagin 6. juni lat framsýningin so upp í norðurlendska stovninum NAPA í Nuuk, og hon lat aftur sunnudagin 22. juni. Hon hevur áður verið í Hetlandi, Írlandi og Íslandi.

Hetta er ein umfatandi framsýning, sum samstarvandi stovnarnir í Útnorði, Norðurlandahúsið í Føroyum og Reykjavík og systurstovnurin NAPA í Grønlandi, hava staðið fyri eftir uppskoti frá Útnorðurráðnum.

»Hetta eru eini týdningarmikil boð til tey, sum halda seg fremja umhvørvisáhugamál best, tá tey banna burðardyggari nýtslu av náttúrunar tilfeingi. Framsýningin eigur tí at gerast atkomulig fyri øllum teimum í Evropa, sum búgva í stórbýum og øllum teimum, sum búgva fjart frá náttúruni, so tey kunnu fáa prógv fyri, at besta varðveitanin av eini fjøltáttaðari náttúru, er ein burðardygg nýtsla og at ein vistskipanarlig hugsan, har eisini havsins súgdjór verða tikin við, er ein nýtsla og atferð, sum hevur verið burðardygg í túsundir av árum, og sum við rættari atferð, eisini komandi ættarlið fara at bera víðari«.

Hetta sigur Jonathan Motzfeldt, komandi formaður í Útnorðurráðnum, um framsýningina »Veiðimentan í Útnorði«, sum hevur verið í Nuuk seinastu vikurnar.